## Broytt tryggingarviðurskifti

Manningarfeløgini hava síðan ár 2000 havt eina felags samlagstrygging fyri limir sínar. Fiskimannafelagið hevur nú gjørt av at tryggja sínar limir hjá ALKA í Danmark. Sum skilst, er hendan avgerð tikin av fakfelagspolitiskum orsøkum. Á aðalfundi í Føroya Skipara-og Navigatørfelag segði formaðurin, Eyðstein Djurhuus, at avgerðin hjá FF ávirkar felags tryggingina rættiliga nógv, tí limirnir í FF í miðal eru 13 ár yngri enn restin. - Kostnaðurin av tryggingini hækkar nevniliga 6%, hvørja ferð miðalaldurin hækkar við einum ári, segði hann. Feløgini, sum nú eru eftir í skipanini, hava samráðst við fleiri veitarar um eina hóskandi skipan, nú fyritreytirnar eru so nógv broyttar. - Sáttmáli er gørdur við LÍV um eina trygging, har útgjaldið við deyða er 700.000 krónur við 50 ára aldur, og hetta lækkar so við 25.000 krónur fyri hvørt ár. Útgjaldið við hættisliga sjúku er nú 100.000 krónur.

# vinnuni

marknaðinum annars.

Hon vísir á, at tá vit fingu broyttu útlendingalógina í fjør summar, og útlit vóru til, at tørvurin á arbeiðsmegi kring um á virkjunum kanska kundi loysast, rendu eisini virkini seg inn í lemjandi fíggjarkreppuna, sum hevur drigið so nógvar óvissur við sær.

- Trupulleikin hjá fiskavirkjunum er, at tey hava ongan pening tjent í fleiri ár, og tí er avmarkað, hvat tey kunnu gera, nú marknaðarútlitini í løtuni eru so óviss.

Stjórin í Vinnuhúsinum vísir á, at tá nøkur viðurskifti, sum virkini hava drigist við í fleiri ár, nú kanska kundu verið loyst, eru tað onnur tyngjandi viðurskifti, ið liggja til bága fyri menning og framburði.

- Í stuttum kann sigast, at fyritreytirnar hava ikki verið við fiskaframleiðsluni – hvørki í undanfarnu árum, og tað eru tey ei heldur í løtuni, nú altjóða fíggjarkreppan setir síni spor á so mongum økjum.



*- Fíggjarkreppan úti í heimi saman við lækkandi gjaldoyravirði hjá okkara kappingarneytum ger, at framleiðsluvinnan er í eini truplari tíð, sigur Marita Rasmussen*

### Økt kapping

Marita vísir á, at aðrar føroyskar vinnufyritøkur eisini hava merkt eina økta kapping úr útlandinum, nú tað treingist um hjá kappingarneytunum í okkara grannalondum.

- Vit hava sæð hesa kapping, tá eitt nú útbjóðingar eru farnar fram her heima. Útlendskar tænastufyritøkur, sum tekna og ráðgeva, hava í størri mun enn áður bjóðað seg fram í kappingini við føroysku fyritøkurnar.

Hon fegnast annars um, at landsmyndugleikarnir í Føroyum hava ásannað, at almenna byggivirksemi ikki skal minkast munandi, tó at fíggjarligu útlitini eru broytt.

- Hetta er at fegnast um, nú líkt er til, at privati marknaðurin við sethúsabygging at kalla er steðgaður upp. Fíggingarstovnarnir eru sera varnir, tí í løtuni er ilt at spráa um, hvussu gongdin fer at verða. Eingin veit, hvussu leingi afturgongdin fer at standa við, og eingin veit, nær vit koma á botn, um man so kann siga.

Marita heldur kortini ikki, at fólk eiga at vera negativ bara fyri at vera negativ, sum hon tekur til.

- Vit mugu síggja í eyguni, at viðurskiftini eru broytt – og at ilt er at spáa um gongdina beint í løtuni.

### Góðar fyritøkur

Spurd, um hon sum stjóri í Vinnuhúsinum hoyrir nógv graml um, at vinnufyritøkur hava trupulleikar við likviditeti, tí fíggingarstovnarnir eru so fastlastir og trekir, sigur hon:

- Nei, eg haldi, at slíkar søgur hoyrast meira frá privatfólki enn vinnufyritøkum. Eg trúgvi, at fíggingarstovnar konsentrera seg meira um tær góðu fyritøkurnar, sum í løtuni eru viðskiftafólk hjá stovnunum enn um at fara út í nýggjar verkætlanir.

Hon heldur, at ein orsøk til stóra varsemi í løtuni er, at danski bankapakkin, sum kom í heyst, bert er galdandi í tvey ár, og at óvissan um, hvat hendir, tá henda tíðin er liðin, skapar varsemi.

- Líkt er tó til, at tíðin, hesin pakki verður galdandi, verður longd, og at hetta kanska fer at lata upp fyri størri rásarúmi.

### Ymiskt hegni

Marita vísir á, at summar fyritøkur í størri mun enn aðrar hava duga at sæð og lagt upp fyri støðuni, sum fíggingarstovnar eru komnir í, meðan aðrar fyritøkur hava verið minni fyrireikaðar.

- Fíggjarkreppan hevur ført til, at eftirspurningurin eftir vørum og tænastum er minkaður, og hetta merkir aftur, at bæði fíggingarstovnar og fyritøkur annars eru vorðin meira varin. Tað er samanfall millum hesi viðurskifti sum ger, at áhugin at fíggja ikki er so stórur í løtuni, leggur hon aftrat.

Stjórin í Vinnuhúsinum fegnast annars um, at støðan hjá fíggingarstovnunum eftir øllum at døma er góð, og at kervinum ikki vantar likviditet.

- Bankapakkin hevur nakrar ásetingar um, hvussu nógv útláninin kunnu økjast, og hetta er ivaleyst ein orsøk til tað varsemi, sum vit síggja í løtuni, har fíggingarstovnar konsentrera seg um tær góðu fyritøkurnar, sigur Marita Rasmussen.